# Skúlin er nóg nær borgaranum sum er

**Lærarafelagið vil ikki góðtaka, at fólkaskúlin verður lagdur undir kommunurnar at umsita**

FÓLKASKÚLIN
*Áki Bertholdsen*

Lærarafelagið góðtekur framvegis ikki, at fólkaskúlin verður lagdur undir kommunurnar at umsita.

Og felagið fer at gera alt, sum tað kann, fyri at forða fyri hesum.

Elsa Birgitta P. Petersen, formaður í Føroya Lærarafelag, er enn sum áður púra avgjørd í síni meining um, hvør skal umsita fólkaskúlan í Føroyum.

Men hon heldur, at tað skal vera undarligt, at landsstýrisfólk úr sama flokki skulu hava so mótstríðandi fráboðanir í einum so álvarsligum máli.

– Herfyri vissaði Annlis Bjarkhamar um, at tað var ongin ætlan um at leggja skúlan undir kommunurnar. Men nú sigur Høgni Hoydal tað beint øvugta.

– Har er ov langt ímillum áskoðanirnir til at vit kunnu hava álit á myndugleikunum, sigur Elsa Birgitta Petersen.



*–Kanska halda kommunur at fáa tær skúlan at umsita, fáa tær eisini ein stóran pengaposa við. Men royndir aðrastaðni vísa, at tær haav forroknað seg og avleiðingin er, at skúlin verður verri og verri, sigur Elsa Birgitta Petersen*

### Kommunurnar forrokna seg

Hon heldur fast við, at tað má ikki henda, at skúlarnir verða lagdir undir kommunurnar.

Hon sigur, at kommunurnar vænta kanska, at fáa ein stóran pengaposa við, tá ið tær fáa skúlarnar at umsita.

– Men royndirnar úr okkara grannalondum vísa, at tær fáa ikki tær upphæddirnar, tær hava roknað við og at skúlin bara versnar og versnar, tá ið hann verður lagdur undir kommunurnar.

– Tað er kanska ikki kommunurnar, sum hava skyldina, men tað vísir seg, at játtanirnar bara minka og minka.

Samstundis hevur norska lærarafelagið fyri kortum verið í verkfalli, tí at tað góðtekur ikki, at tað skal samráðast við kommunurnar um lønir.

Hon sigur, at verður skúlin lagdur undir kommunurnar at umsita, verður tað í ein ávísan mun hugburðurin hjá kommunustýrislimunum, sum ger av, hvørjar sømdir, skúlin fær.

– Tað er eisini stórur vandi fyri, at umisitingin av skúlanum verður tengdur at fíggjarligu støðuni hjá hvørjari einstakari kommunu. Fer tað at tátta í fíggjarliga hjá eini kommunu, vita vit at royndum, at skúlin og almannaverkið eru teir stovnarnir, sum verða teir fyrstu at merkja spariknívin.

Tað kemur eisini fyri, at lærarar fáa ikki tilfar til keyps, tí kommunur eru so ringir gjaldarar og tað er eisini stórur munur á, hvussu skúlabygningar verða røktir.

Tað er somuleiðis rættiliga stórur munur á, hvussu skúlarnir í teimum ymsu bygdunum eru fyri. Yvirhøvur raðfesta kommunur skúlarnar høgt, men tað eru sanniliga eisini undantøk.

– Alt hetta hendir, hóast skúlin er undir miðfyrisitingini, sum krevur eitt minstamark av skúlunum.

Elsa Birgitta Petersen sigur, at eitt er at umsiting skal verða so nær brúkarunum sum gjørligt.

– Men hetta er at fara borgarunum ov nær og fyri at tryggja eina javntgóða undirvísing í øllum skúlum, er tað alneyðugt, at skúlin verður umsitin av miðfyrisitingini.

Elsa Birgitta P. Petersen sigur, at tí hevur tað av størsta týdningi, at umsitingin av skúlanum verður verandi undir undir miðfyrisitingini.

– Annars verður vandin alt ov stórur fyri, at skúlarnir og tilboðini til næmingarnar verða ymisk, alt eftir, hvønn hugburð hvør einstøk kommuna, hevur.

Formaðurin í Lærarafelagnum sigur, at eitt endamál er at koma nærri brúkarunum, men Føroyar eru so lítið land at tað er óneyðugt at koma nærri brúkaranum í hesum føri.

Hon veit ikki, hvat fer at henda, men felagið fer at gera tað, sum kann gerast fyri at forða fyri hesi ætlanini og hon utihýsir heldur ikki, at tað kann koma upp á tal at seta tiltøk í verk.

# Landsstýrið ætlar at kollvelta fólkaskúlan

**Landsstýrið arbeiðir við eini ætlan um at leggja fólkaskúlan undir Kommunurnar at umsita**

FÓLKASKÚLIN
*Áki Bertholdsen*

Landsstýrið arbeiðir framvegis við eini ætlan um at leggja fólkaskúlan undir kommunurnar at umsita og reka.

Hetta upplýsti landsstýrismaðurin í kommunumálum, Høgni Hoydal, fyri stýrinum í Kommunusamskipan Føroya í síðstu viku.

Kommunusamskipanin hevði biðið hann koma á fund at greiða frá, hvørjar ætlanir Landsstýrið í hevur á hesum øki.

Kommumusamskipanin tók hetta stigið eftir at Annlis Bjarkhamar herfyri kunngjørdi í Sosialinum, at Landsstýrið ongar ætlanir hevur um at lata kommunurnar yvirtaka fólkaskúlan. Hetta gjørdi landsstýriskvinnan greitt í einum svari til forkvinnuna í Føroya Lærarafelag, sum beint frammanundan hevði sagt í Sosialinum, at Lærarafelagið fór at berjast ímóti eini slíkari ætlan við hond og fót.



*Tað er framvegis ætlanin hjá Landsstýrinum, at fólkaskúlin skal leggjast undir kommunurnar at umsita og reka, hevur Høgni Hoydal upplýst fyri Kommunusamskipan Føroya*

### Vilja hava greiði á

Jógvan Krosslá, formaður í Kommunusamskipanini, sigur, at ætlanin var tí at fáa greiði á, hvat Landsstýrið ætlaði tí í einum áliti, har ábyrgdarbýtið ímillum land og kommunur verður viðgjørt, stendur, at kommunurnar skulu eisini umsita skúlan, eins og eldraøkið, barnaansing o.a.

– Men nú Annlis Bjarkhamar sigur tað beint øvugta, vildu vit hava greiði á málinum, so at kommunurnar ikki brúktu kreftir uppá at fyrireika seg til mál, sum kanska ikki blivu sett í gildi kortini.

Men Høgni Hoydal vissaði um, at arbeitt verður víðari eftir teimum ætlanum, sum eru lagdar.

Men nær fólkaskúlin verður lagdur undir kommunurnar, visti hann ikki.

Ætlanin er fyrst at síggja, hvussu væl tað hepnast hjá kommununum at umsita og reka eldraøkið, sum tær fáa ábyrgdina av 1. januar.

Í hesum sambandi segði landsstýrismaðurin, at ætlanin er at seta ein politiskan bólk at fylgja við hesum arbeiðnum. Í bólkinum skulu sita landsstýrismenninar í fíggjarmálum, trivnaðarmálum og kommunumálum, umframt formenninir í Kommunusamskipan Føroya og Føroya Kommunufelag mynda henda bólkin.

Jógvan Krosslá legur dent á, at tað er landsstýrið, sum vil hava skúlarnar undir Kommunurnar at umsita og at reka kommunurnar tí mugu fyrireika seg til tað.

Ì hesum liggur at kommunurnar skulu umsita allan skúlan og at tað hereftir skal vera Kommunuala Arbeiðsgevarafelagið, sum skal samráðast um lærаralønirnar, men at tað verður eftir yvirskipaðum reglum og eftirlitið frá Landsstýrinum, so at skúlin verður eins um alt landið.



# Stórt føstulávintstiltak í Mentanarhúsinum

**Lagt verður fyri í dag við barna-og grýlutiltaki, har Angela og Hannibal verða við. Kalt borð verður kl. 20, og seinni í kvøld verður 60-ára dansur. Í morgin verður vísukonsert við Stanley Samuelsen og Hanusi G. Johansen**

TILTØK
*Vilmund Jacobsen*

Í dag og í morgin verður Mentanarhúsið í Fuglafirði karmur um fleiri tiltøk, bæði fyri børn og vaksin.

Klokkan 16 í dag fara kendu andlitini, Angela og klovnurin, Hannibal, at undirhalda, og børn fara at lata seg í sum grílur.

Tær tríggjar vakrastu grílurnar fáa virðisløn, sum er ein kassi av sodavatn í part frá Faxe, sum Poul Michelsen umboðar.

Børnini fáa føstulávintsbollar og sodavatn og tey vaksnu, sum eru við børnunum, fáa ein kaffimunn.

Samson Nesá sigur, at hetta er eitt barnatiltak, har tey vaksnu eru vælkomin at verða saman við børnunum.



*Myndin er av Silly Boys undir venjing í Mentanarhúsinum hóskvøldið. Hin bólkurin, sum fer at spæla til dansin í kvøld, er Thunderbirds.*

### Kalt borð og dansur

Frá klokkan 20-23 í kvøld verður stórt, kalt borð í Mentanarhúsinum við dinner-tónleiki á klaveri.

Kalda borðið kostar 195 krónur, og Samson Nesá sigur, at fleiri pláss eru eftir.

- Best er at bíleggja sær pláss, sigur hann.

Eftir kalda borðið verður 60-ára dansur til kl. 03.45 við gomlu bólkunum, Silly Boys úr Fuglafirði og Thunderbirds úr Vestmanna.

Dansurin kostar 130 krónur, og atgongumerki kunnu keypast í forsølu.

Samson sigur, at pláss er fyri 660 fólkum til dansin.

### Vísukonsert

Í morgin, sunnudagin kl. 19.30, verður vísukonsert í Mentanarhúsinum við Stanley Samuelsen, sum er sangari í Silly Boys og Hanusi G. Johansen.

Samson Nesá sigur, at konsertin væntandi varar einar tveir tímar og atgongumerki, sum kosta 100 krónur, kunnu keypast við dyrnar.



*Í morgin fara Stanley Samuelsen (mynd) og Hanus G. Johansen at hava vísukonsert í Mentanarhúsinum.*

# Útróðrarfiskur skal kølast niður umborð

**Matvørudeildin hjá Heilsufrøðiligu Starvsstovuni fer nú at kanna, um hagreiðingin av útróðrarfiski fer fram sambært kunngerð, ið er ásett av Føroya Landsstýri og byggir á krøv hjá ES**

ÚTRÓÐRARFISKUR
*Vilmund Jacobsen*

Eftirlitið við hagreiðingini av útróðrarfiski skal nú styrkjast.

Hetta hevur Heilsufrøðiliga Starvsstovan hevur gjørt av.

- Matvørudeildin hjá okkum fer komandi tíðina at kanna, um hagreiðingin av útróðrarfiski er í samsvari við galdandi reglur. Eitt av krøvunum er, at útróðrarfiskur verður niðurkøldur umborð á bátinum - so hvørt, sigur Starvsstovan.

Víst verður á, at krøvini eru ásett av Føroya landsstýri í kunngerð og hava verið galdandi í mong ár.

- Hetta varð gjørt við heimild í løgtingslóg nr. 46 frá 21. juni 1985. Kunngerðin byggir beinleiðis á ES-direktiv 92/48.



*Møguleikin fyri einum munadyggum eftirliti við útróðrarfiski er nógv betur nú enn áður, tí nú kunnu bert løggildar landingarmiðstøðir landa og taka ímóti fiski. - Í fyrstu atløgu fara vit bert at krevja, at allur útróðrarfiskur verður køldur niður um 4 stig umborð, sigur Heilsufrøðiliga Starvsstovan.*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

### Bundið seg

Heilsufrøðiliga Starvsstovan sigur, at Føroyar sambært avtalum við ES hava bundið seg til at fylgja hesum ásetingum.

- Vit eru tann almenni myndugleikin, sum í hesum sambandi skal veita keyparalondunum trygd fyri, at reglurnar verða fylgdar.

ES reglurnar staðfesta, at fiskur skal kølast niður móti markinum, har ísur smeltar.

- Vit fara bert í fyrstu atløgu krevja, at allur útróðarfiskur verður køldur niðurum 4º C umborð, sigur Heilsufrøðiliga Starvsstovan.

### Betur nú

Mett verður, at møguleikin fyri einum munadyggum eftirliti nú er nógv betri enn áður, tí nú kunnu bert løggildaðar landingarmiðstøðir landa og taka ímóti ísfiski.

- Landingarmiðstøðirnar hava við løggildingini fingið nøkur rættindi og nakar skyldur. Soleiðis er álagt einstøku landingar-miðstøðini at fylgja við, um fiskurin, sum móttikin verður, er hagreiddur samsvarandi krøvunum.

Heilsufrøðiliga Starvsstovan kann gera nærri reglur fyri, hvussu landingarmiðstøðirnar fyrihalda seg til fisk, sum ikki lýkur ásettu krøvini.

- Vit fara nú miðvíst í gongd við hetta eftirlit, verður sagt á Matvørudeildini hjá Heilsufrøðiligu Starvsstovuni.

VIT LATA UPP
í nýggjum hølum í dag
PIFF · PAFF · PUFF
opið er frá 10 - 17